Zarepta

# Familjulega fyri fólk við breki

RØRSLUÁRIÐ

Hjartaliga vælkomin á legu á Zarepta í døgunum 7.-10. mai 2009

Legan er ætlað øllum, ið bera brek, og familjum teirra.

Á leguni, sum verður myndað eftir luttakaraynski, er millum annað:

- fyrilestrar
- pallborð
- samtalubólkar
- andakt
- kvøldsøga
- sangur
- tónleikur
- leikvenjing
- fimleikur
- ríðing
- svimjing
- gongutúrar
- spæl úti og inni
- ymisk ítriv
- video
- busstúrar
- gallakvøld

**Fyrilestrar:**
**Fríggjdag 8. mai**
Kl. 10.00 Jákup Jacobsen, Yndi Fitness: "Rørsla ber bata – tað, ið tú gert, ger tað av fullum huga!"

**Fríggjdag 8. mai**
Kl. 15.15 Mariann Patursson: »Heilsugott – heilsugóður lívsháttur«

**Fríggjdag 8. mai**
Kl. 19.00 Christian Ludvig Dam: »Uttan at sveitta – KLD-body«

**Leygardagin 9. mai**
KL 14.00 Elisabeth Guttesen o.o.: »Tunglyndi- eitt sindur um orsøkir, eyðkenni og viðgerð«

**Havið hetta við**
- Dýnuvár, koddavár og lak
- Um tú verður við á túrum og svimjing – heit klæði, gonguskógvar, regnklæði, gummistivlar og svimjiklæði.

**Kostnaður fyri leguna:**
- Børn 0-5 ár.................................100 kr.
- Børn 6-14 ár..............................225 kr.
- Vaksin ..........................................400 kr.

Konto 6460 1609787

Húsið er opið hóskvøldið kl. 18.00

Nátturði verður boðin frá kl. 19.30

Legan verður sett kl. 21.00

Ring til ein av undirritaðu, um spurningar eru í sambandi við leguna.

**Norðoyggjar**
Jógvan Tróndheim, tlf. 456822

**Suðuroy**
Majbritt West, tlf. 375284 / 575284

**Annars**
Elisabeth Mortensen, tlf. 317244 / 517244

Samly Reinert, tlf. 318720 / 518720

Tilmelding er hjá Samly Reinert 518720 ella t-post: brek@zarepta.fo í seinasta lagi mikudagin 29. apríl.



Sosialurin
www.sosialurin.fo






# Lærarastørv í Viðareiðis Skúla

**Hesi størv verða lýst leys at seta frá 1. august 2009:**
- 1 fast fulltíðarstarv
- 1 tíðaravmarkað fulltíðarstarv vegna lækkað tímatal og avlopstímar
- 1 tíðaravmarkað fulltíðarstarv fyri lærara í barnsburðarfarloyvi – fram til 18. des. 2009
- Møguliga 1 starv á umleið 6 avlopstímar. Endaliga tímatalið verður ásett eftir 1. sep.
- 1 stuðul við pedagogiskari ábyrgd 22 tímar um vikuna. Uppgávan er at virka sum stuðul hjá næmingum við serligum tørvi.

**Tey, ið sett verða skulu:**
- undir ábyrgd leiðslunnar taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva
- verða fús at taka á seg tær uppgávur, ið eru í skúlanum
- vera við til áhaldandi at menna skúlan

**Skúlanum tørvar lærarar, ið m.a. kunnu átaka sær at undirvísa í:**
- føroyskum, donskum og enskum
- støddfrøði, náttúru/tøkni og lívfrøði
- kristni og søgu
- handaverki og list
- tónleiki og ítrótti
- flokslærari í 1. fl.
- flokslærari í 6. og 7. fl.

**Førleikakrøv**
Læraraútbúgving ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum.

Ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir**
Lærarastørvini verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so at tey, ið sett verða, eru tænastumannasettir lærarar frammanundan.

Lærarastørvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 – 29.2.

Stuðulsstarvið verður lønt eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálastýrið.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvi, c.v. og møgulig viðmæli skulu vera skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi týsdagin 12. mai kl. 12.00.

Viðareiðis Skúli
Heygavegur 7
FO – 750 Viðareiði

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til skúlaleiðaran, Jensebeth Absalonsen, á tlf. 45 11 80 ella 23 10 80.

**Í Viðareiðis skúla** Viðareiðis skúli hevur komandi skúlaár 55 næmingar frá 1. – 7. flokk. 7 lærarar og ein stuðul starvast í skúlanum. Tú kanst lesa meira um okkum á heimasíðuni www.skulin.fo/vid





50
1959–2009

# KLH aðalfund

Kristiligt Lurtara- og Hyggjarafelag (KLH) hevur ársaðalfund Kr. Himmalsferðardag, hósdagin 21. mai 2009 kl. 15 í Meinigheitshúsinum í Havn.

**Fundarskrá**

1. Ársfrágreiðing
2. Ársroknskapur
3. Val av nevndarlimum
4. Val av tiltakslimi
5. Val av grannskoðara
6. Ymiskt

Uppskot, sum limir ynskja at koma til viðgerðar á aðalfundi, og uppskot til nevndarlimir, mega vera formanninum, Una Næs, 530 Fuglafjørður, í hendi 8 dagar frammanundan aðalfundinum.

Til ber at seta seg sum lim á ársaðalfundinum.

Í sambandi við aðalfundin, verður alment møti í Meinigheitshúsinum í Havn kl. 20.

*KRISTILIGT LURTARA OG HYGGJARAFELAG*

Mørkin 10 · 530 Fuglafjørður · tel 44 40 13
klh@klh.fo · www.klh.fo

KLH er einasta skipaða lurtara- og hyggjarafelag í Føroyum – stovnað 6. apríl 1959. Endamál felagsins er at virka fyri kristiligum sendingum í almenna kringvarpinum t.d. kristiligum fundum, gudstænastum, andaktum, kristiligum sangi og tónleiki, tíðindum frá kristiligum arbeiði o.t.

KLH styðjar kringvarpið í góðum og sømiligum sendingum. KLH arbeiðir fyri at kringvarpið ikki verður nýtt til ósømiligar sendingar o.a., ið er ikki kristnum siði og kristnari trúgv verdugt.

KLH er limafelagsskapur við 1200 limum. Set teg sum lim í KLH og ver uppií arbeiðinum fyri góðum tilfari í almenna kringvarpinum.

